er altíð okkurt..., leggur hann so aftrat.

Hann heldur, at yvirhøvir eru dómararnir í Føroyum í so skjótir at floyta fyri hørðum spæli; tað gongur aftur og aftur, at dómarar leggja út við eini harðari linju, men so megna teir ikki at halda henni; ov nógv fet verða ov sjáldan sektaði sum tey eiga; og tað verður ikki ansað nóg væl eftir yvirtráðkingum.

- Tað seinasta er ein spurningur um avtalur og samskifti ímillum dómararnar báðar, og tað er oftast alt ov vánaligt, sigur Hannis.

Hannis og Dia hava dømt í so nógv ár, sigur Hannis, at teir hava somu tulkingar, og teir hava eisini fastar avtalur um, hvør dómur skal galda, um teir døma hvør sítt í eini ávísari støðu. Áðrenn hvønn dyst tosa teir saman um okkurt serstakt, teir skulu hava eyguni eftir, t.d. ávísum leikaraónollum.

Spurdur um tað ikki kann hava við sær, at teir hefta seg við teir leikararnar meira enn gott er, svarar Hannis, at tað er sjálvandi ein vansi í tí.

Hannis heldur at tað er óheppið, at leikarar døma, hóast hann sjálvur dømir.

- Mær dámar tað einki, tí sjálvt um man ger sítt besta, so spælir tað helst ótilvitað inn, at ein er so nógv uppi í tí heila, sigur Hannis.





- Hevur tú nakran tíð dømt beiggja tín (Uni Wardum, ið spælir við Neistanum)?

- Ja, svarar Hannis og sigur bersøgin, at tað helst er til Una'sa fyrimun. Er tað eitt ivamál um álopsmistak ella triggja metrakast, so fær hann helst fyrimunin frá mær, hóast eg ikki gái um tað.

- Kann tað ikki virka hin vegin, - at tú dømir hann strangari, so eingin skal koma og siga at...

- Soleiðis er tað helst í mongum førum, men ikki hjá mær, sigur Hannis.

Herfyri - í dystinum ímillum SÍÍF og Neistan - koyrdi Hannis fyrrverandi liðfelaga sín Sophus Dahl-Christiansen út í tveir minuttir.

- Kendi eg hann ikki so væl, so hevði hann óivað fingið reyða kortið, sum hann leikaði í, sigur Hannis og leggur aftrat:

- Næsti dystur hjá okkum er ímóti Neistanum, so eingin skuldi koma og siga, at eg hevði sett ein av bestu neistaleiarunum uttanfyri tann dystin!

Hannis heldur tað vera umráðandi, at vit fáa eitt dómaraeftirlit, sum kann tryggja, at dømt verður eftir eimi aðal-linju.

- Og so fleiri dómaraskeið, har serliga fyrrverandi leikarar møta upp!

Hannis Wardum vandamikil álopsleikari á kyndlaliðnum: - Í Føroyum eru vit í so skjótir at briksla fyri hørðum spæli

Dómararnir mugu mangan standa fyri skotum. Her er tað Kristian Johansen, ið fær eitt mótmæli frá H 71-mál-verjanum Hákuni Djurhuus

Hans Holm um at seta dómarar eina ferð um vikuna:

Tað letur seg ikki gera!

- Vit hava fleiri eldri leikarar við dómaraprógvi, men teir hava prioriterað okkurt annað øki innan hondbóltin enn dømingina, - í summum førum fyri at fáa frið, frið fyri ónøgdum áskoðarum, sum meira enn so kunnu finna uppá at gera vart við seg úti á gøtuni.

- HSF hevur roynt at fingið eina dómaraeygleiðaraskipan í lag, men tað hevur verið ov tilvildarligt og er dottið niður fyri aftur, sigur Hans Holm. Tað verður ikki fyrrenn at vit hava leik-arar, sum eru leikarar og ikki dómarar, og dómarar, sum eru dómarar og ikki leikarar, at ein munandi bati verður, og tað tykist vera langur vegur, endar Hans Holm.

Hans Holm, sum er kappingar-leiðari HSF sigur, at tað letur seg illa gera at seta dómarar fyri hvørja viku sær, sum Axel Axelsson skjýtur upp.

- Tað er ikki tí at eg eri ósamdur við Axeli, men tað er ein praktiskur spurningur, sigur Hans Holm.

Sambært lógum HSF, so skal ein dómaranevnd veljast, og uppgáva hennara er at skipa fyri skeiðum, framhaldandi útbúgvingum og øllum dómarasetingum o.ø. í sambandi við landskappingina.

Men í løtuin er eingin dómaranevnd, tí hvørki á aðal- ella eykaaðalfundinum eydnaðist at manna hana.

Tískil hevur kappingarstjórin sjálvur verið noyddur at seta dómarar fyri alt grundspælið.

- Eg havi ríkiligt um hendurnar sum er og vil ikki hava liggjandi á hvørja viku at seta dómarar; men kanska kundu teir verið settir í størri bitum, kanska fyri trý, fýra vikuskifti í senn.

Um skipanina sum hon er í løtuni sigur Hans, at tað hevur verið eitt ynski frá leikarum, feløgum og dómarum, at dómararnir eru settir so langt framyvir sum gjørligt.

Fleiri hava verið á skeiði, og seinastu tvey árini hevur Halvor Jensen hildið væl vitjaði skeið fyri royndar dómarar.

- Okkum vantar leiðarar á øllum økjum, so tað eru meir og minni somu fólkini, sum ganga aftur á ymiskum økjum, sigur Hans, og leggur aftrat, at støðan verður ikki betri fyrrenn fleiri gerast aktiv á leiðarastøði.



Bridge

Arnbjørn Sivertsen

1. deild

Jóannes Mouritsen—Óli Holm	21—9
Eyðun Jensen—P.S. Sørensen	20—10
Børge Egholm—Petur Reinert	22—8
Marni Gaard—Kjartan Johansen	13—17
P.S. Sørensen—Jóannes Mouritsen	7—23
Óli Holm—Eyðun Jensen	14—16
Kjartan Johansen—Børge Egholm	5—25
Petur Reinert—Marni Gaard	13—17
Jóannes Mouritsen—Marni Gaard	25—5
Eyðun Jensen—Børge Egholm	19—11
P.S. Sørensen—Petur Reinert	15—15
Óli Holm—Kjartan Johansen	11—19

Støðan eftir 5. umfar:

1. Jóannes Mouritsen	102 stig
2. Eyðun Jensen	95 stig
3. Børge Egholm	91 stig
4. Marni Gaard	66 stig
5. P.S. Sørensen	62 stig
Kjartan Johansen	62 stig
Petur Reinert	62 stig
8. Óli Holm	60 stig

2. deild

Finn Ougaard—Leif Pedersen	25—4
Simin Hansen—Marita Mohr	12—18
Sigrid Guðjónsson—Einar Ellingsgaard	21—9
Súsanna Dam—Dagny Askham	20—10
Marita Mohr—Finn Ougaard	15—15
Leif Pedersen—Simin Hansen	13—17
Einar Ellingsgaard—Súsanna Dam	12—18
Dagny Askham—Sigrid Guðjónsson	16—14
Finn Ougaard—Súsanna Dam	16—14
Simin Hansen—Sigrid Guðjónsson	18—12
Marita Mohr—Einar Ellingsgaard	24—6
Leif Pedersen—Dagny Askham	12—18

Støðan eftir 5. umfar:

1. Finn Ougaard	106 stig
2. Simin Hansen	91 stig
3. Súsanna Dam	89 stig
Marita Mohr	89 stig
5. Sigrid Guðjónsson	82 stig
6. Dagny Askham	55 stig
7. Leif Pedersen	45 stig
8. Einar Ellingsgaard	37 stig

Eitt spæl frá dystinum millum botnliðini í 1. deild, Óla Holm og Kjartan Johansen.

N/N-S

	♠ Q-J-9-8-5 ♡ A-9 ◇ Q-2 ♣ A-Q-8-2	
♠ K-7 ♡ 10-8-7-5-4 ◇ 9-5 ♣ 7-6-5-4	N V E S	♠ A-10-4-3 ♡ K-3 ◇ J-10-8-7-6 ♣ K-J
	♠ 6-2 ♡ Q-J-6-2 ◇ A-K-4-3 ♣ 10-9-3	

N	E	S	V
Áki	Sjúrður	Arnbjørn	Poul Joh.
1 sp	D	RD	pass
pass	2 rú	2 út	pass
3 út	pass	pass	pass

Útspæl: rú 9

Vestur spældi litin hjá viðspælaranum út. Suður tók á hondini og spældi spaðara út móti borðinum. Vestur tók við konginum og spældi rútara útaftur til frúnna á borðinum. Suður spældi nú sp Q av borðinum, og Eystur fall frá. Hjartaraess, hjartara til kongin hjá Eystri og rútara útaftur til essið. Eystur skuldi nú kasta tvey kort av til hj Q og J. Hann kastaði ein spaðara og ein rútara — hin møguleikin er sp Á ella kl J! Nú var bert eftir hjá Suðri at spæla Eyst inn í rútara ella spaðara. Eystur varð noyddur at spæla kleyvaran frá K-J upp ímóti A-Q á borðinum.

Við hitt borðið var Suður farin niður, so liðið hjá Kjartani fekk 12 tiltrongd imp. í tí hørðu kappingini í botninum í 1. deild.